# Úr roykstovuni til Hollywood

**Við kveikandi fyrilestrum, sum umrøddu alt frá hugskoti til altjóða gjøgnumbrot, endaði stóra átakið hjá Gluggaglæmu mikudagin við stórari snið og handverksráðstevnu í Norðurlandahúsinum**

RÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*



*Sera hóskandi vóru tað konufólk við stokkum heldur enn mappumenn í klædningi, sum myndaðu fleiri av áhoyraraplássunum á ráðstevnuni um snið og handverk*

Tað er ikki á hvørjum degi, at listhandverk setur dagsskránna bæði í vinnulívskjaki og fjølmiðlunum. Kortini er tað eydnast fyriskiparnum av snið og handverksátakinum Gluggaglæma seinastu tvær vikurnar at fáa øll eygu vend móti smáu handverksvinnunum við vónum um at skapa teimum betri sømdir. Og uppskotini um, hvussu farast kann fram, trutu ikki á stóru ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum mikudagin, sum var hildin undir heitinum "Snið og handverk í heimligum og altjóða høpi."

### Heimabundið í Hollywood

Tað vóru konufólk við stokkum heldur enn mappumenn í klædningi, sum myndaðu fleiri av áhoyraraplássunum, tá Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, setti ráðstevnuna. Og eisini hann treiv í aldargamla bindingarkynstrið, sum altíð hevur verið ein nátúrligur liður í gerandisdegnum hjá føroyingum, og sum føroyskar kvinnur handfara so meistarliga, sum hann tók til.

- Nú um dagarnar hoyrdist, at stóru stjørnurnar í Hollywood eru farnar at binda sínar egnu troyggjur. Í so máta mugu vit sigast at hava nakað heilt serligt at lena okkum aftur á, við at tað fyri okkum so gerandasliga og nátúrliga er vorðið nakað serstakt og ein fyrimynd hjá øðrum, segði Bjarni Djurholm millum annað.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, nýtti høvi at tríva í gama føroyska bindingarkynstrið, tá hann sett ráðstevnuna um snið og handverk í Norðurlandahúsinum mikudagin*

Hóast Føroyar eru ov smáar til at kunna gerast ein altjóða miðdepil fyri skapandi vinnur, helt landsstýrismaðurin, at hetta avgjørt kann gerast ein fyrimunur, um vit bera okkum rætt at. Ein lítil tjóð ella vinna kann smoyggja sær inn ímillum tær stóru inn á smáur røkurnar, sum onnur kanska ikki hava fingið eyga á. Ì øllum førum eru tað nú so nógv dømi um, at føroyingar listarliga í allar mátar megna at virka á jøvnum føti við onnur í alheims høpi. At hesar livandi vinnur við síni sermerktu sál hava ein møguleika og eina framtíð ivaðist landsstýrismaðurin ikki í.

- Spurningurin er, um ikki tann skapandi stættin hevur skyldu at fara út í heim við síni vinnu. Tit eru búgvin til tað, og møguleikarnir eru har. Vónandi taka tit av, segði landsstýrismaðurin millum annað.

### Ullkorn og stórir dreymar

Eftir setanina vóru ein røð av fyrilestrum á skránni, sum viðgjørdu alt frá tí fyrsta varsliga hugskotinum til altjóða gjøgnumbrotið. Sera hóskandi byrjaði orðstýrarin Urd Johannesen við at lesa eitt "ullkorn" úr eini ulltavu á borðinum. Ullkornini vóru tankar, dreymar og ynskir, sum fyriskiparnir Randi S. Vang og Jonhild Johannesen høvdu savnað á síni kanningarferð av føroyskum handverki seinasta árið. Soleiðis varð alt fyri skapað eitt samband millum stóru hugsjónirnar á pallinum í Norðurlandahúsinum og ynskini frá teimum, sum í tí smáa sita og fáast við síni handverk heima.

Ein av mest kveikandi framløgunm var fyrilesturin "Mótasniðgeving í binding" hjá ungu Jóhonnu Reginsdóttir av Steinum. Jóhanna er lesandi á Saint Martin's College of Art London, har hon er væl á veg a gera sín gamla dreym um at gerast sniðgevi í bundnum pløggum til veruleika. Á ein sera livandi hátt greiddi Jóhanna frá gongdini, frá tí hon kastaði uppá sína fyrstu lítlu dukkutroyggju til nú, ið altjóða mótaheimurin bíðar. Undir framløguni sóust myndir á stórskíggja frá portfoliuni, Jóhanna hevði við sær til upptøkusamrøðuna á skúlanum. Framløgan endaði við eini forvitnisligari mótaframsýning við nøkrum av nýggjastu pløggunum hjá Jóhonnu. Fleiri orð nýttust sanniliga ikki fyri at vísa, hvussu langt unga argjadáman er komin, síðani fyrsta dukkutroyggjuna.

### Sniðgevaradepil - ein fyrimynd

Sum dømi um, at næstan alt ber til, um vilji er til tess, greiddi Michael Lange frá Erhvervscenter for erhverv, vækst og udvikling frá Montre verkætlanini í Keypmannahavn. Montre er eitt slag av sniðgevaradepli, har 20 ungir sniðgevar fáa loyvi at húsast og sýna fram í eitt ár fyri at koma í gongd innan vinnuna. Ein aðaltáttur í verkætlanini er ráðgevingin, sum eisini húsast í bygninginum, og sum sniðgevarnir hava ókeypis atgongd til, tá tey hava tørv á tí.

Fyri nógvar av føroysku áhoyrarnum mundi hetta ljóða sum ein órøkkiligur dreymur. Og spurningurin um, hvussu man kundi farið undir nakað líknadi í Føroyum varð eisini alt fyri eitt reistur. Verður Montre verkætlanin nýtt sum fyrimynd, krevur tað eina íløgu uppá eina millión kr, og eigur raksturin, sambært Lange, at vera ein almenn uppgáva. Í tí stóra rokni stykkinum ljóðaði hetta ikki av nógvum, so kanska hetta kundi sett nakrar tankar í gongd hjá bæði ívérksetarum av ymsum slagi og ikki minst politikarum.



*"Ullkornini" í ulltavuni hjá Urd Johannesen, orðstýrara, skaptu eitt tankavekjandi samband millum stóru hugsjónirnar í Norðurlandahúsninum og ynskini hjá teimum, sum í tí smáa sita heima og fáast við síni handverk*

## Grøn armbond til frama fyri Krabbameinsfelagið

Tey væl umtóktu Livestrong gummiarmbondini fáast nú eisini til keyps í føroyskari útgávu. Tað er Føroya Felag móti Krabbameini, ið hevur latið gjørt grøn gummiarmbond. Inntøkan fer óskerd til arbeiðið at bøta um umstøðurnar hjá føroyskum krabbameinssjúklingum og avvarðandi teirra.

Tað var kendi súkklarin Lance Armstrong, ið hevur havt krabbamein, sum kom við hugskotinum at gera gummiarmbond til frama fyri arbeiðið at basa krabbameini. Gulu Livestrong armbondini eru vorðin eitt hitt um allan heim. Inntøkan av teimum fer í grunnin, sum Armstrong hevur sett á stovn; peningurin fer allur til gransking av krabbameini í USA. Síðan hava onnur fingið sama hugskot, tí fáast armbondini í nógvum litum og inntøkan fer til nógv endamál. Vilt tú stuðla Føroya Felag móti Krabbameini, so keypir tú eitt grønt armband. Navnið hjá felagnum stendur á.

Armbondini kosta 20 kr. Tey fáast til keyps á Statoilstøðunum kring landið, í Grifflinum í SMS, á Tjaldurs Apoteki og á skrivstovuni hjá Føroya Felag móti Krabbameini.